

*Zacharias Heinesen: Frí náttúrulýsing. 1993*

# Føroysk fronskum

Tann 19. mai í ár fyllir listamaðurin Zacharias Heinesen (1936) sjeyti ár. Samstundis eru tað í ár hundrað ár síðani ein stór fyrimynd Zachariasar, franski listamaðurin Paul Cézanne (1839-1906) andaðist. Eitt eygnakast á føroysku listasøguna ber boð um, at tað ikki bert er Zacharias Heinesen, ið er hugtikin av Cézanne

**LIST**
*Kinna Poulsen*



*Saint Victoire fjallið var eitt myndevnið, Cézanne dyrkaði*



*Ingálvur av Reyni: Sóljur. 1947*

Í dygdargóða, men stokkuta mentanartíðarritinum Bragi var ein serliga áhugaverdur teigur, ið nevndist "Fyrimynd", har myndlistafólk greiddu frá einum listaverki, ið hevði veitt teimum listarligan íblástur. Listafólkini valdu høvuðsverk úr vesteuropisku listasøguni. Ingálvur av Reyni greiddi frá sínum yndisverki hjá italska meistaranum Uccello, meðan Torbjørn Olsen hevði valt eina av litmeldursmyndunum hjá tí eldra Monet. Í blaði nr. 1/2001 greiðir Zacharias Heinesen frá Cézanne og mynd hansara "... Kyrrlutamynd við súreplaskál" 1879-82. Hann skrivar m.a.: "Seinastu myndir hansara kunnu tykjast ólidnar. Hann hevði ognað sær so stóran kunnleika innan bæði materiali og málningahátt, at hann kundi skapa eina málning við fáum strokum". Her sum í tekstinum í síni heild, hóma vit stóru virðingina fyri franska listamanninum, sum tordi at fara sínar heilt egnu vegir, ið skuldu føra til kollveltingar í heimslistini.

## Cézanne

Cézanne var avgjørt ikki nakað undurbarn, men mátti veruliga stríðast fyri at gerast listamaður. Hann var 21 ára gamal, tá hann avgjørdi at gerast listamálari, men varð av ráðaríka pápa sínum noyddur at lesa lógfrøði. Hann fór tí ikki av álvara í gongd við listina fyrr enn nøkur ár seinni. Tað gekk ikki so væl í fyrstani og Cézanne fann seg bæði tá sum alt lívið í støðugum iva, hvørt hann var ein góðtakiligur málari ella ei. Hann búði styttri tíðarskeið í listarliga miðdeplinum Paris, men vendi altíð heimaftur til sín elskaða heimstað, Aix í Provence, har hann búði og málaði tað mesta av ævi síni. Listarliga tók hann støði í tí gamla romantiska stílinum, sum hann byrjaði at avrita, m.a. við Delacroix sum fyrimynd. Rættiliga skjótt fingu myndirnar ein serliga pastosan, tilfarsligan dám, ið góvu gruna um, at hesin málarin ikki var nøgdur við at kopiera teir gomlu meistararnar. Yrkisleið Cézannes fór fram samstundis við ta hjá impressionistunum, sum hann eisini framsýndi saman við fleiri ferðir, eins og fleiri av myndum hansara vísa greiðan íblástur frá hesum listaráki, sum kollvelti listaheimin í 1870 unum. Cézanne var saman við m.a. Manet og Degas øðrum fleiri ferðir frávístur almennu framsýningini, Heystframsýningini, sum var nálareygað, tú skuldi ígjøgnum, um tú ætlaði tær eina yrkisleið innan myndlistina í tátíðar Fraklandi.

## Impressionisma

Cézanne var hugtikin av impressionistunum, av teirra reinu litum og royndum at fanga ljósið í uttanduramálningum. Men hann saknaði harmoniska sniði, fullfíggjaðu javnvágina og sterka einfeldi, sum hann helt eyðkendi listaverkini hjá teimum klassisku meistarunum sum t.d. Nicolas Poussin (1594-1665) í hvørs myndum allir formar og rørslur tykjast samsvara hvørjum øðrum. Cézanne dámdi ikki óruddiliga og tilvildarliga árinið í impressionistiskum myndum og setti sær fyri at skapa eina list, sum var veruleikatrúgv, men sum samstundis var ótilvildarlig, føst komponerað og harmonisk. Hesum stríddist hann við í mong ár og fann sína heilt egnu loysn, sum er ein av orsøkunum til, at Cézanne er mettur at vera ein tann mest umráðandi slóðbrótarin fyri tí kubistisku og seinni tí abstraktu myndlistini. Sum vit síggja í fleiri landsløgum og kyrrlutamyndum frá 1880 og frameftir er stórur munur millum málingarháttin hjá Cézanne og tann hjá impressionistunum. Hitt lutfalsliga bjarta og reina litavalið hava teir til felags, men meðan myndevnini hjá impressionistunum tykjast meir ella minni upployst av ljósárini, ið sæst sum prikkar og blettir, tykjast bæði súrepli, skálir og bakgrund á kyrrlutamyndini hjá Cézanne hava sera fastan og haldgóðan form. Myndflatin er bygdur upp sum eitt mynstur av geometriskum formum, sirklum, ovalum og fýrkantum, sum eru íbirtir av paralellum pensilsstrokum.
Tað er serliga áhugavert við myndunum hjá Cézanne, at hann manipulerar við perspektivinum í myndunum, eins og hann umframt myndevninum sjálvum, gevur bakgrundini skugganum, luftini, mjørkanum og táminum fastan form. Við øðrum orðum tykist rúmdarillusiónin; tað at tú sansar dýpdina í myndarúminum ikki serliga umráðandi og hetta, at tað verður pilkað við illusionistiska perspektivið, er ein av orsøkunum til, at Cézanne er skýrdur faðir at modernaðu listini.

## Kubisma

Síðani renesansuna hevði listin verið mimetisk ella veruleikaeftirlíknandi eins og eitt vindeyga móti heiminum. Tað vóru myndir Cézannes, ið saman við frumkendari list gávu Pablo Picasso (1881-1973)